## Ronaldo aftur til Manchester

Seinasta mánaðin hava bløð kring alt fótbóltseuropa meira ella minni staðfest, at Ronaldo komandi ár verður seldur úr Manchester United til Real Madrid, men nú verður ivi sáddur um hetta í enska the Sun. Blaðið skrivar, at Ronaldo nú hevur tosað við arbeiðsgevarar sínar í Manchester, og at boðini til hesar var, at Ronaldo er aftur í Manchester tann 10. juli. Áður hevur annars ljóðað, at skiftið til Real Madrid verður veruleiki longu 7. juli.



## Amager tryggjar talentini

FC Amager, sum leygardagin vissaði sær uppflyting til donsku 1. deild, hevur í vikuni skrivað undir sáttmálar við tveir av evnaríkastu spælarunum á Amager. Talan er um 18-ára gamla Anders Karlsen og 17 ára gamla Mathias Johannsen, sum báðir hava havt tilboð frá fleiri øðrum feløgum. – Vit eru errin av, at báðir tveir hava valt at spæla fyri okkum. Talan er um tveir sera evnaríkar spælarar, og vit vóna, at teir innan stutta tíð kunnu verða millum berandi kreftirnar á besta liðnum, sigur Todi Jónsson við danska bold.dk.

### Ikki fingið fótin fyri seg

Annar av málskjúttunum, Páll Mohr Joensen, vil ikki siga, at HB hevur fingið fótin fyri seg nú.

- Vit siga hvørjaferð, tá vit hava vunnið, at nú verður øðrvísi. Vit skulu ikki hugsa longur enn um komandi uppgávuna, sigur hann.

Um dystin á Skála, staðfestir málskjúttin, at tað var torført at spæla á vøllinum.

- Hann var sera turrur, og ferð kom ongantíð á bóltin. Tað var eisini ein orsøk til, at dysturin ikki varð vælleiktur. Fleiri tilvildarstøður vóru, men tað var ikki avgerandi. Vit vóru við yvirlutan, og sigurin var uppiborin.

*Rúni Nolsøe, venjari, hevði broytt uppstilling undan dystinum – hvønn týdning hevði tað?*

- Vit kunnu so staðfesta, at tað riggaði. Men sum sagt, vit spældu ikki væl, staðfestir Páll Mohr Joensen.

### Skála verður í Formula-deildini!

Obele Okeke Onyebuchi, eisini róptur Obi, vil ikki hoyra talan um, at Skála verður millum tey næstbestu í komandi kappingarári.

- Vit fara ikki at flyta niður. Liðið er ov gott til tað. Vit kunnu nógv meira, enn stigatalvan vísir eisini. Vit hava havt leikarar uttanfyri, sum nú koma aftur. Og eg eri vísur í, at tað fer at gera mun. Tað hevur verið torført hjá mær sum einsamallur framherji, men nú er Bogi Gregersen komin eisini. Bíða bara, lovar Skála-áleyparin.

*Úrslitini hava í øllum førum ikki verið við tykkum, og nú taptu tit eina ferð enn?*

- Seinni hálvleikurin í gjár var dømi um, hvat vit kunnu. Vit høvdu tamarhald á tí, og høvdu vit verið meira neyvir, høvdu vit fingið stig burtur úr dystinum. Tað var uppiborið, at teir vóru á odda við tveimum í steðginum, men eftir hvíldina vóru vit omaná. Tvey verjumistøk var orsøkin til, at teir vunnu sær leiðsluna, og tað var torført at koma aftur. Men vit stríddust væl, staðfestir Obele Okeke Onyebuchi.

HB-Skála 1-2 (0-2):

# Ein lítil uppreisn

*Skála*

*HB*

**Tað hevur ikki gingið serliga væl í hond hjá HB seinastu vikurnar. Í gjár fingu havnarmenninir eina lítla uppreisn, tá teir vunnu á Skála**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Fyri fyrstu ferð í seks royndum vann HB, tá teir mikukvøldið vitjaðu á Skála*

*savnsmynd*

Fyri fyrstu ferð í seks royndum eydnaðist aftur HB at enda sum sigursharri, tá høvuðsstaðarfelagið vitjaði á Skála í gjár. Teir reyðu og svørtu hava verið í stórum aldudali seinastu tíðina, har hagtølini nú siga tríggir sigrar í seinastu 12 dystunum.

Hóast keðiligu gongdina, so vann HB seg upp aftur á annað plássi í Formula-deildini í gjár. Við tveimum málum móti einum var næsti sigurin á útivølli veruleiki. Í broyttari uppstilling eydnaðist umsíðir venjaranum Rúna Nolsøe at fáa trý stig aftur.

### Skoraðu øll trý

Broytingar vóru hjá gestunum í gjár. Fróði Benjaminsen var leikbannaður, Ólavur í Ólavsstovu var ikki við orsaka av skaða, meðan Poul Thomas Dam byrjaði á beinkinum. Í framrættaðari 4-3-3 uppstilling legði HB bragdliga fyri, og fyrstu løtuna í tveimum førum lagt seg á odda.

Páll Mohr Joensen hevur staðið seg sera væl í hesum kappingarárinum. Hann var darvaður av skaða í fyrstu umførunum, men hevur seinastu vikurnar verið millum stuðulsleikararnar hjá Rúna Nolsøe. Tað var eisini havnarmaðurin, sum legði teir reyðu og svørtu á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Miðvallarin varð – eftir frálíkt uppspæl - spældur einsamallur við málverjan av Andrew av Fløtum, og uttan trupulleikar sendi hann framvið Predrac Markovic.

Skála hevði ikki nógv at bjóða í fyrra umfarinum. HB var á bóltinum fyri tað mesta, men tað var torført at fáa ferð á bóltinum á turra vøllinum.

Jákup á Borg hevur ikki avrikað tað, sum væntað hevur verið av honum, í hesum kappingarárinum. Ov stór sveiggj hava verið í hansara spæli, men undir Mýruhjalla í gjár var hann vælupplagdur. Landsliðsleikarin átti seinasta fótin, tá gestirnir øktu um leiðsluna. Við fínum skoti sendi hann HB á sigurskós.

Vagnur Mohr Mortensen var aftur í miðverjuni hjá havnarfelagnum í gjár, og hann átti ein óhepnan leiklut, tá helmingurin av seinna umfarinum var leikt. Verjuleikarin og Tróndur Vatnhamar púrasta misskiltu hvønn annan, og Mortensen stýrdi innleggið í egið mál.

### Skála trýsti

John Petersen hevur helst saknað eitt sindur av dirvi og ágrýtni í sínum leikarum í hálvleikinum. Skála var munandi betri við eftir hvíldina, og í løtum eydnaðist tað at trýsta gestirnar. Tað gav eisini úrslit, tá sjálvmálið kom.

Heimaliðið royndi at søkja at, men veruliga vandamiklir gjørdist teir sjáldan. John Petersen skifti seg sjálvan inn móti endanum, men tað hjálpti lítið.

HB gjørdi ikki nógv av at avgera dystin, men hugsaði meira um tær verjukendu uppgávurnar. Tað eydnaðist eisini, tí fleiri mál komu ikki í dystinum.

Rúni Nolsøe og hópurin fingu lítla uppreisn eftir keðiligu gongdina seinastu umførini. Nú gongur leiðin til Svøríki, har seinni Intertoto-Cup dysturin móti Elfsborg skal avgreiðast. Hans á Lag noyddist í gjár út við skaða, og tað er ikki vist, um hann verður tøkur.

Skála stríðist framvegis fyri at sleppa upp um niðurflytingarstrikuna. Seinastu uppgávurnar hava verið KÍ, B36 og HB, og tvey stig eru komin burtur úr. Mánakvøldið vitja teir av skálarfjørðinum á Toftum. Eydnast tað at fáa trý stig byrja toftamenn eisini so smátt at nærkast botnstríðnum.

### FAKTA um dystin

**Skála – HB 1-2 (0-2)**
**0-1:** Páll Mohr Joensen, 22.
**0-2:** Jákup á Borg, 41.
**1-2:** Sjálvmál, 54.
**Dómari:** Rúni Gaardbo
**HB:** Tróndur Vatnhamar – Mortan úr Hørg, Hans á Lag (46.: Poul Thomas Dam), Vagnur Mohr Mortensen, Rasmus Nolsøe – Páll Mohr Joensen (72.: Rógvi Poulsen), Kári Nielsen, Milan Kuljic - Jákup á Borg (85.: Pætur Jørgensen), Andrew av Fløtum, Christian Høgni Jacobsen
**Gult kort:** Eingin
**Skála:** Predrag Markovic – Bárður Danielsen, Pætur Dam Jacobsen, Erland B. Danielsen, Alin Balutoiu (Jógvan G. Joensen, 85.), Pauli G. Hansen (Atli Kristiansen, 46.), Sjúrður Djurhuus, Obele Okeke Onyebuchi, Arnhold Berg, Vali Miela, Teitur R. Joensen (Bogi Gregersen, 90.)
**Gult kort:** Arnhold Berg